

# Oljuvinnan setir ferðina niður

D
**Jan Müller**

06.03.2014 - 18:40

Oljan.fo

Um allan heimin eru feløg, sum leita eftir olju, farin at seta fótin á bremsuna, og greinarar ávara nú um, at hetta fer at raka tænastufyritøkurnar í oljuvinuni.

Ein oljuprísur upp á 100 dollarar fyri tunnuna røkkur ikki til útreiðslurnar, sum standast av virkseminum at leita eftir nýggjari olju, og allastaðni hava oljufeløg sett ferðina niður og skarvað av íløgunum. Sambært Dagens Næringsliv rakar hendan gongdin veitingarfeløgini, og serliga seismikkfeløgini siga seg vera meint rakt. Men greinarar ávara um, at broytingin kann eisini raka onnur, og teir mæla íleggjarum til at selja partabrøv í feløgum, sum ikki eru fallin so nógv í virði enn, skrivar DN.

John Olaisen, sum er greinari hjá ABG Sundal Collier, væntar óvanligar niðurskrivingar í seismikkfeløgunum, tí at inntøkurnar standa ikki mát við íløgurnar. Í roynd og veru eru øll seismikkfeløgini í vandabólkinum, sigur hann.

- Spurningurin er, hvussu leingi oljufeløgini fara at bíða við at økja íløgurnar aftur. Í løtuni verður gitt, um tey fara at hava óbroytt íløguvirksemi, ella um tey fara at seta ferðina eitt sindur upp í 2015, sigur John Olaisen.